


*Nr. 9* *29. apríl 2018* *78. árg.*

# Gleði í Harranum er styrki tykkara

*Nehemia 8,10.*

Harrans lóg varð lisin upp fyri Ísraels fólki, og tey brustu í sjóðheitan grát, tá ið tey hoyrdu hana. Nehemia og Ezra lótu tey tó hoyra, at tey misskiltu støðuna, tí Harrans lóg var tekin um Guds tokka og góða vilja. Staðin fyri at gráta áttu tey at glett seg og hildið leyvskála hátíð í sjey dagar. Tað gjørdu tey, „tí tey høvdu skilt orðini, sum vóru boðað teimum,“ og gleðin í Harranum gjørdist styrki teirra.

Hvat sigur hetta okkum í dag? – At vit misskilja støðuna, tá ið vit halda, at tað bara eru trupulleikar av Guds lóg. Harrin hevur givið okkum lóg sína, fyri at tær kreftir, sum vilja oyðileggja lívið, ikki skulu verða við yvirlutan. Guds lóg hoyrir við til vælgerðir Guds.

Ja, men er tað **ikki** rætt, at vit ikki eru undir lóg, men undir náði? Jú, rætt er tað. Um vit skuldu verða frelst við at halda lógina, kom ikki ein einasti av okkum á mál. Tí er okkurt **hent.** Kristus hevur verið her á fold, og lógin er fyri okkum í Nýggja Sáttmálanum ein tyktari, sum lærir okkum, at vit ikki kunna umvera Kristus. Lógin hjálpir okkum at finna okkara rætta pláss í lívinum. Men tann sami Gud hevur givið fólki sínum Kristus og sent hann í heimin. Tað mugu vit ikki gloyma.

„Tí at gleði í Harranum er styrki tykkara!“

Tað skal hart og týðiliga ljóða fyri okkum, sum hava hildið páskir.

Vit æra ikki Gud við at gremja okkum um, hvussu ómøguligt tað er at halda lógarinnar krøv. Vit æra bara Gud, um vit taka ímóti vegleiðing hansara, sum hon er givin okkum í Jesusi Kristi. Í honum eru Guds náði og Guds vilji komin til sjóndar, og ongin kann hvíla í Guds náðarorði uttan at kenna seg bundnan at Guds vilja.

„Tí at gleði í Harranum er styrki tykkara!“ Er tað sannleikin um okkum í dagliga lívi okkara? Eru vit í hernaði, fyri at trúarinnar gleði kann fáa ræðið í atferð okkara.

# Hví ert tú altíð so glaður?

Tað var ein smágenta, ið spurdi mammubeiggjan: „Hví ert tú altíð so glaður? Tá ið tú fert til arbeiðis um morgunin, ert tú glaður, og tá ið tú fert til songur – allan dagin ert tú glaður og væl nøgdur.“ Mammubeiggin, ið júst kom inn úr garðinum, har hann hevði spælt við nøkur børn, bert smíltist.

„Jamen, góða, hví setir tú altíð fríska mjólk á borðið til mammubeiggja?“ „Jamen,“ svaraði gentan, „hví í allari víðu verð skuldi eg sett súra mjólk á borðið, tá ið vit eiga nógva fríska mjólk inni?

Mammubeiggin smíltist: „Lurta nú. Hvønn morgun, tá ið eg fari upp, taki eg Bíbliuna fram, lesi eitt petti, og síðani biði eg til Guds, at hann má geva mær megi til at fullføra dagsins verk. Hvørt kvøld, tá ið eg fari til songar, lesi eg aftur eitt petti úr Bíbliuni, og síðani biði eg aftur til Guds, at hann má geva mær megi til at fara ígjøgnum ein dag afturat.

Skuldi eg so ikki verið glaður og lukkuligur, at eg hvønn dag fái loyvi til at byrja ein nýggjan dag við signing frá Gudi. Sanniliga hevur Gud verið góður við meg, og eg havi alla orsøk til at vera glaður!“

*A.J.*

---

Fyrr í tíðini ballaðu tey einki inn, tey søgdu tað hart og hvast. T.d. segði William Booth, stovnari Frelsunarhersins, sum gekk runt og hjálpti alkoholikarum: „Eg biði, at hvør einasti av offiserum mínum má vera í helviti í 10 minuttir, tí so sær hann, hvussu sær út inni har, og tískil vil hann restina av ævi síni boða Kristus og bjarga menniskjum frá hesum.“

*e.c.* ums.

# Kærleikans hendur

*Sí, í mína hond havi eg rist teg* *Jes.49,16*

Myndin, sum Jesaja nýtir, skal siga okkum, at Harrin hugsar um okkum, og alt, sum hann ger, hevur til endamáls at fremja hitt allarbesta. Hann vil taka sær av okkum í øllum førum og verja okkum. Hansara og okkara áhugi renna saman.

Varnast kærleika hansara og lat kærleikan kveikja virksemi í tær at virka fyri hann. Hann arbeiðir fyri teg, fyri at tú skalt arbeiða fyri hann, og foldarferð tín verður honum verdig.

Og tú veitst, at hansara hendur nú eru gjøgnumgataðar fyri tína skyld. Arr hansara eru vissa um hansara stóra kærleika til okkara. Gerst hetta stórt fyri tær, verður eisini tín kærleiki til hansara heitur og livandi. Tá fert tú eisini at æra hann, hvat ið tað so kostar.

Latum okkum tí minnast til, at okkara nøvn eru rist í hansara hendur, so at okkara kærleiki til hansara kann verða endurnýggjaður dag undan degi. Og tá ið ivi og myrkur leggjast yvir okkum, og tá ið vit gerast bangin, latið okkum so lýða á Frelsarans orð: „Sí, mínar hendur!“ Tá verða vit troystað og uppliva stóra gleði.

*t.* týddi.

# Hvat líður náttini?

Í løtuni hvílir náttin yvir jørðini. Tað kennist, sum myrkrið tyngir niður yvir okkum. Vit hoyra og síggja ræðulig tíðindi í miðlunum: fólk, sum rýma úr heimlandi sínum, flóttafólk í yvirfyltum bátum, fólk í hundraðtali til gongu eftir vegunum, ræðuleikarnir, sum IS fremur, veðurlagsbroytingar við kolandi ódnum og brotasjógvum, og nú til seinast smittandi sjúkur. Hvat verður endin, og hvussu leingi varar hetta?

Soleiðis spáar Jesaja: „Vøkumaður, hvat líður náttini? Vøkumaður, hvat líður náttini?“ Vøkumaðurin svarar: „Morgunin kemur, men enn er nátt.“ Jes. 21,11–12. Hetta eru verkirnir, áðrenn Jesus kemur aftur. Verkirnir gerast títtari og harðari, áðrenn barnið verður borið í heim, og soleiðis er eisini í endans tíð. So vit skulu ikki vænta, at alt verður sum fyrr.

MEN, latið okkum ikki gloyma mentuna í lívsins roknistykki, JESUS. Hann ger allan munin. Myrkrið hevur havt sína forsøgu í Gamla Testamenti, tá ið Ísraels fólk trælaðu í Egyptalandi. Harrin sendi 10 plágur yvir egyptar, og ein av plágunum var myrkur: „Tá segði Harrin við Móses: „Rætt út hond tína móti himni, so skal koma yvir Egyptaland tílíkt myrkur, so takandi er í tað!“ Og Móses rætti út hond sína móti himni; tá varð bølamyrkur um alt Egyptaland í tríggjar dagar. Eingin sá annan, og eingin flutti seg haðan, sum hann var staddur í tríggjar dagar; men allar staðir, har ísraelsmenn búðu, var ljóst.“ 2. Mós. 10,21–23.

Ja, ísraelsmenn búðu og virkaðu í bjartasta sólarljósi, og tað sama lovar Jesus sínum. Hann sigur soleiðis: „Eg eri ljós heimsins. Tann, sum fylgir mær, skal ikki ganga í myrkrinum, men hava lívsins ljós.“ Jóh. 8,12.

„Tí sí, myrkur hylur jørðina og sorti fólkini; men yvir tær rennur Harrin upp, og dýrd hans birtist yvir tær.“ Jes. 60,2. Einki grunnskygd hjálpir í lívsins avbjóðingum. Vit mugu meina tað í álvara og bjóða Jesusi inn í okkara hjarta. Tá eru vit púra trygg. Les allan Sálm 91, øll lyftini eru til tín.

*Effie Campbell.*

---

Politikkur hevur ongantíð skapað veking; men veking hevur broytt politikkin. Vekingin hjá metodistum og kvekarum var ein týðandi kraft at avtaka trælahaldið og geva kvinnum atkvøðurætt til parlamentsvalið í Onglandi. Arbeiðið hjá Frelsunnarherinum í fátækrabýlingunum var ein sterkur íblástur hjá arbeiðararørsluni.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 29. apríl | Tekstur: 1. Sám. 1,9–20; | bíbliuorð: 1. Sám. 2,3c og 2,1–2 |
| 6. mai | Tekstur: 1. Sám. 3,1–18; | bíbliuorð: 1. Sám. 3,10b |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
**Umbróting & prent:** Prenta – 35 77 74




***Nr. 10*** ***13. mai 2018*** ***78. árg.***

# Jesu vald

*Eg havi vald til at seta tað til, og eg havi vald til at taka tað aftur. Jóh. 10,18.*

„Mannaættin stynjar undir byrðuni av framstigum sínum.“ Hesi orðini, sum komu frá einum vitugum manni, noyða menniskju at hugsa seg væl um og spyrja, um tað veruliga er so, at vit eru ávegis inn í framburð, tá ið óttin veksur? Vit standa hugtikin og hyggja at, tí valdið yvir náttúrunnar kreftum økist, og tí at prógvini um vald eru øgilig. Men er tað ætlanin, at eitt vald skal hava ótta við sær? Kann hugsast, at okkurt er skeivt við metingarháttinum? Er størsta valdið ikki stýrt av kærleikanum, og vísir tað seg ikki fyrst og fremst sum ein ***innari*** megi?

Minnist tú støðuna, har Pilatus og Jesus langafríggjamorgun standa yvir av hvørøðrum? Pilatus heldur fast um vald sítt, og ein og hvør sær, at hann kann nýta valdið; honum nýtist bara at seta navn sítt undir, so kann deyðadómurin fullførast. Yvir av honum stendur Jesus, og ein og hvør sær, at hann er tann máttleysi, sum bara kann elska, tæna, líða og doyggja. Og so kortini? Hvør teirra hevur størri vald? Hvønn av hesum báðum hevur heimurin mest tørv á?

„Eg havi vald at seta lív mítt til, og eg havi vald at taka tað aftur,“ sigur hann, sum rópar seg tann góða hirðan. Hann kann og vil geva okkum lut í hægsta slagnum av valdi, tí, sum verður stýrt av kærleikanum, og sum ger okkum før fyri at liva lívið rætt.

Men skal sambandið millum hann og okkum verða knýtt, mugu vit læra at meta øðrvísi, tá ið orð skulu setast á, hvat vald merkir. Í hesum heimi er tætt samband millum harðskap og makt, og tí skapar valdið ótta. Í Ríkinum, sum ikki er av hesum heimi, er tætt samband millum kærleika og vald, og tí skapar valdið frið. Ikki skuldi verið so torført at sæð, í hvørjum ríki best er at vera.

# Hondin, sum mær heldur

*Stígi eg til himna upp, sí, tá ert tú har; lyfti eg mær á veingjum morgunroðans, setist eg við hitt ytsta hav, eisini har man hond tín meg leiða, og høgra hond tín mær halda.*

*Sálmur 139, 8–11.*

Tá ið Ísraels børn hugsaðu um, at Gud var allastaðni, fóru tey at skelva. Gud sá alt, og hvørja ferð hansara lóg varð brotin, vórðu tey revsað. Men nú, tá ið hann gjøgnum son sín hevur víst okkum sín órannsakandi kærleika, gleðast vit um, at hann allastaðni hugsar um alt, sum viðvíkur okkum. Hann er við okkum allastaðni, ja, líka til heimsins enda.

Skulu vit enn fyrigeva øðrum menniskjum, tí vit hava skyldu til tess, so er hann tó hjá okkum. Og tó at eitt menniskja sum hin yngri sonurin savnaði alt sítt góðs og fór til eitt fremmant land, so skal hann eisini har finna okkum. Harrin vil skapa okkara lívsumstøður soleiðis, at vit geva kærleikanum gætur, sum ikki vil sleppa okkum.

Ikki ein løta kann koma í lívi okkara, at hann er langt burturi frá okkum. Tí hvat skal skilja okkum frá hansara kærleika í Jesusi Kristi? Enntá í deyðans dimmu dølum er hann við okkum. Og tá ið vit standa fyri ævinleikans trónu, skelva vit ikki – enntá har vil hann halda okkum í kærleika sínum.

*t.* týddi.

---

Vit hava áhaldandi vant okkum til at vera áskoðarar. Vit halda, at vit kunnu sita á fremsta beinki og síggja ólukkuna raka øll onnur fólk og ikki okkum. Men tað er ein tornarósusvøvnur, sum vit brádliga kunnu vakna úr, men ov seint.

*e.c.* ums.

# Hann á tekjuni

*Uffe Nissen*

„Nóa og synir hans, kona hans og sonarkonur hans við honum fóru tá inn í ørkina undan vatnflóðini ... Og Harrin læt aftur eftir honum.“ (1. Mós. 7,7.16) Tað vóru óivað mong á Nóa døgum, sum høvdu sín máta at sleppa undan vatnflóðini. Men bara Nóa og hansara familja vórðu frelst, av tí at tey fóru inn í ørkina eftir treytum Harrans. „Og Harrin læt aftur eftir teimum.“

Tey fóru ígjøgnum harðveðursdagar og nætur, men mitt í øllum kendu tey ein ómetaligan tryggleika. Harrin hevði sjálvur latið aftur eftir teimum. Hann hevði tikið ábyrgdina á seg.

Jødarnir hava knýtt eina søgn upp í frágreiðingina um flóðina miklu. Hon er um ein mann, sum vildi frelsast eftir sínum egnu treytum. Hann kallaðist Irad, og hann hevði sína egnu klóku ætlan í kvittanum. Hann vildi ikki kvetta við verðina, men um nú Nóa kortini skuldi havt rætt, so ætlaði hann at leita sær friðskjól á tekjuni á ørkini. Har innrættaði hann seg í góðari trúgv. Men sum frá leið fekk hann ikki hildið sær føstum á tekjuni. Har var hvørki lívd ella føði, hann doyði saman við øllum hinum. Uppi á ørkini, ikki inni í henni! Mong vilja frelsast upp á tann mátan, soleiðis eitt sindur í nánd av øllum, hvørki køld ella heit. Men tað riggar ikki í ódnarveðri – tá fellur tað hálva hjartað og tað flógva sinnið saman við verðini.

Frelsan er, at Harrin letur aftur eftir okkum!

*Effie Campbell* umsetti.

# Kærleikin drívur teg

Ein maður segði eftir at hann hevði verið á einum kristiligum fundi: „Eg eri glaður um, at eg fyri mongum árum síðani gjørdi meg lidnan við Gud.

Maðurin, sum hevði talað á fundinum, svaraði: „Tú skalt vera fegin um, at tú veruliga ikki hevur rætt í hasum. Tí Gud er ikki liðugur við teg. Um so var, høvdu vit mugað borið teg út hiðani.“

Gud hevur givið okkum lívið, fyri at vit skulu leita til hansara. Ótroyttiliga gevur hann okkum gávur, so at vit hava alt, sum okkum er tørvur á. Tí lívið sjálvt er ein full signing!

Ætlanin við øllum tí góða, sum Harrin gevur okkum, er at vit skulu venda tonkum okkara ein nýggjan veg. Hann vil, at vit ikki skulu taka alt sum eina sjálvfylgju. Bíblium spyr: *Ella vanvirðir tú ríkidømið av góðsku hansara og tolmóði og langmóði, og veitst ikki, at Guds góðska leiðir teg til umvendingar?* (Róm. 2,4).

# Tríggir koddar

Ein kvinna var vorðin gomul og skilti, at nú hevði hon ikki nógv eftir. Hon var heilt trygg, tá ið hon hugsaði um, at nú var alt skjótt liðugt. Tá ið ein kristin vinur undraðist á, hvussu rólig og trygg hon var, segði hon: „Tá ið eg var ein lítil genta, segði ein trúboðari, at hann hvørja nátt svav væl, tí hann hevði tríggjar koddar at lata høvdið hvíla niðurá. Hann kallaði teir *„Guds náði, Guds kraft og Guds vísdómur.“*

Eg haldi, at um tú og eg hava slíkar koddar, verður lættari at sova, lættari at liva dag um dag og lættari at doyggja, tá ið tann tíðin kemur.

Pætur ápostul var eins og hinir kristnu leiðararnir upptikin av tí náði, kraft og vísdómi, sum Jesus hevur givið okkum:*“ Við tað at hansara guddómligi máttur hevur givið okkum alt tað, sum hoyrir til lívs og Guds ótta við kunnugleikanum um hann, sum kallaði okkum við síni egnu dýrd og kraft“*. (2. Pæt. 1,3).



## SUNNUDAGSBLAÐIÐ

***ynskir øllum eina gleðiliga Hvítusunnu***

***Heilsan Blaðstjórin.***



**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 13. mai | Tekstur: Matt. 28,16–20; | bíbliuorð: Matt. 28,20b |
| 20. mai | Tekstur: Áps. 2,1–18; | bíbliuorð: Áps. 1,8 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
**Umbróting & prent:** Prenta – 35 77 74